# Hendingar í Havn ófriðarárið



A. GUTTORMUR DJURHUUS



Havnin á leið 1800

Mynd: Fornminnissavnið

### Jákup Nolsøe, stutt ævisøga

*Jákup Nolsøe livdi frá 1774 til 1869. Hann man hava verið sera dugnaligur, tí hóast bróðir Nólsoyar Páls, hann var yngstur, gjørdist hann í 1808 bókhaldari hjá kongaliga handlinum í Havn. Hann hevði frammanundan verið krambakallur. Í 1831 gjørdist hann stjóri á sama stovni.*

*Hann hevur latið eftir seg skjal sum greiðir frá fleiri merkisverdum hendingum í árinum 1808. Sum tænastumaður hjá handlinum hevur hann havt serliga góðar umstøður at eygleiða tað ið fór fram í nærumhvørvinum har hann arbeiddi. Hann sat á fyrsta beinki! Sjálvur hevur hann viðhvørt verið uppi í sjálvum hendingunum.*

*Ovastin, sum tá var Løbner, sat ikki væl um satt við Jákup Nolsøe, men munnu teir seinni hava sættast, tí í 1817 skrivar Løbner rósandi um hann til myndugleikarnar í Keypmannahavn og heldur, at føroyingar sjálvir við hansara hjálp kunnu yvirtaka handilin við útlond, tí hann dugir bæði siglingarfrøði og handilsskap.*

### Inngangur

*Skjalið, sum her er flutt úr gomlum donskum máli í nútíðarføroyskt er ikki dagfest, men kann tíðarfestast til at vera skrivað ikki fyrr enn í 1809, helst nakað seinni, og ikki seinni enn í 1817.*

*Viðhvørt eru nøvn skeivt stavað ella eru gloppin burturímillum, tó uttan at skjalið gerst ólesiligt. Bøtt er um hetta í umsetingini, men roynt er samstundis at vera so trúgvur móti upprunatekstinum sum gjørligt. Skjalið er sjey og eina hálva foliusíðu stórt. Fyrsta og síðsta síða eru avmyndaðar.*

*Í kassunum við transkribering úr gotiskari til latínska skrift, er beinleiðis skrivað tað, sum í handritinum stendur. Yvirskriftirnar til brotini eru mínar.*

Vit lata Jákupi Nolsøe orðið.

### Tá Skansin varð tikin av bretum

Hin 1. mai fekk eg bræv frá bróður mínum Pálli Nolsøe, skipara, sum tá búði á garðinum Norðoyri, har hann sigur, at hann hevði verið til fiskiskap og hevði havt samband við eina kutterbrigg, sum var har á leiðini. Manningin segði seg vera franska, men tosaði bert týskt. Teir fregnaðust, hvussu mannsterk verjan á Skansanum í Havn var. Bróðir, sum í níggju ár hevði siglt upp á Frakland, Ongland og Amerika sá, at skipið uttan iva var ein vápnaður onglendingur og svaraði tí, at hann ikki fyri vissu kundi siga, hvussu nógvir teir vóru, men at teir mundu vera einir 100 mans.[1]

Heimkomin sendi bróðir beinanvegin bræv til ovastan, Løbner kaptain við boðum um at skipið, teir høvdu havt samband við, var ein ensk kutterbrigg, sum hevði ilt í huga.

Hin 3. mai sigldi skipið gjøgnum Nólsoyarfjørð undir fronskum flaggi og stevndi beint á Skansatangan, men fall síðani av aftur. Klokkan fimm seinnapartin var eitt skip at síggja sunnanvert Borðuna. Hin 16. legði skipið seg fyri akker uttan fyri Skansan í stuttum skotmáli og vant enska flaggið upp. Loðsbátur fór til skipið at vita, hvat ið áfatt var. Av tí at eingin bátur kom afturíaftur, sendi ovastin ein bát afturat og seinni ein triðja – við sama úrsliti. Allir bátarnir við manning vórðu tiknir. Harímillum vóru sersjanturin Svendsen og deknurin Hans á Lag. Manningarnar vórðu koyrdar í lastina sum fangar. Hetta fór fram sama kvøldið.

Á Skansanum vóru fleiri 12 punds kanónir, og uttanfyri verjugarðin vóru átta løddar 18 punds kanónir, sum vendu beint ímóti skipssíðuni, men varð fíggindaskipið ikki praiað eina einastu ferð!

Klokkan tvey um náttina vórðu fýra bátar við fremmandari manning sæddir at fara frá skipinum. Bátarnir løgdu at undir Trøðni, og manningarnar fóru í land. Við Hans á Lag, sum tvingaðum vegleiðara marsjeraði gongan beina leið móti teimum tveimum kanónunum á Skansanum, sum um tær høvdu verið løddar við brotpettum og latnar av, uttan iva høvdu rikið gonguna aftur.

> **Stríðshugaðir kaldbaksmenn**
>
> Almuen heromkring forventede at der skulde foranstaltes en sammenkaldelse af Almuen for med kraft at kæmpe mod Fjenden og man hørte at der i Kaldbak vare støbte Blykuler i den hensigt, men hvad bestilte Kommandanten mens alt dette foregik? Han var rigtignok paa Skansen og hans Mundering med, men den laa begravet i en Sæk., han var derimod en grov graa Overkappe – hvorfor den engelske Kaptajn Bough og hans folk kaldte ham The Monkey (Abekatten). Hans kommandoord var "Børn læg jer ned".

Fólkið her um leiðir roknaði við at verða boðsent, við megi at stríðast ímóti fíggindanum, og tað frættist, at í Kaldbak vórðu stoyttar blýkúlur til endamálið. Men hvat hevðist ovastin at, meðan hetta fyrifórst? Hann var vissuliga á Skansanum og búni hansara somuleiðis, men hann var undanstoppaður í einum posa. Sjálvur var hann hinvegin ílatin ein tjúkkan gráan yvirkappa. Enski kaptainurin og hansara menn kallaðu hann tí "the monkey" (apan). Boðorð hansara vóru:"børn, leggið tykkum".

Fíggindin, sum heilt ótarnaður hevði tikið Skansan, vant beinan vegin enska flaggið á stong, brutu ella typtu allar kanónirnar, tóku av innbúnum tað, teimum hóvaði, og góvu annars teymum, sum vildu hava tað, ið teir ikki sjálvir skoyttu um. At enda sprongdu teir krúthúsið í luftina.

Fyri okkum var heilt greitt, at tær átta 18 punds kanónirnar á verjugarðinum høvdu megnað at søkt briggina Clio. Tá Skansin hevði givið seg upp, vissaði kaptainurin um, at um bert eittans skot hevði verið loyst av av Skansanum, hevði hann beinan vegin havt kvett akkerstogið og rýmt. Hin 17. á kvøldi fór Clio av stað, og tók við sær nýggju lossijaktina.



Jákup Nolsøe, 1774-1869

Mynd: Fornminnissavnið

### Brillumaðurin herjar

Hin 1. juni ankraði briggin Salamina á Eystaru vág. Høvuðsmaðurin kom í land og varð nevndur Hompesch barónur. Hann segði seg vera franskmann. Hann vitjaði Løbner, landfútan Hammershaimb og umsjónarmannin Mørck. Hvat ið fyrifórst teirra millum er ikki til at siga, men út á dagin boðaði Hompesch frá, at hann var enskur kápari og kravdi at fáa loðs av staðnum, tí hann segði seg ætla sær at fara at krússa fram við norsku strondini.

Henda sama dag var bróðir komin til Havnar, og tað kann ætlast, at Løbner og felagar høvdu peikað á bróður og Hansen kaptain, ein her búgvandi skipara, sum nýtiligar loðsar hjá eingilskmanninum. Men bróðir hevði avgjørt at fara ein túr til Keypmannahavnar við tí her smíðaðu skonnartini Royndini fríðu, fyri um gjørligt skjótast at fáa flutt nakað av vøru heim, tí so lítið var til av matvørum í Havn, at bert ein áttindapartur av einum kari kundi lutast út til hvørt fólkið um vikuna. Tí kravdi hann pass til ferðina av Hompesch, sum hesin skrivaði út, men handaði tað til Løbner.

Nú var Hansen skipari rýmdur, og øði spann í Hompesch og hann hóttivið at seta eld á býin, um ikki var fingið fatur aftur á Hansen skipara. Meðan leitað varð eftir Hansen, loysti briggin trý skarpløðd skot av inn yvir býin, men hetta var bert fyri at ræða fólkið,